## Eyðun í Leikalund

Tann næsta mánaðin fer listamaðurin Eyðun av Reyni at hava framsýning í Leikalund í Klaksvík. Ferniseringin verður fríggjakvøldið, og í tí sambandi er Leikalund opið til klokkan 23. Eyðun av Reyni, sum hevur listaútbúgving úr Danmark, hevur havt nógvar framsýningar, síðani hann luttók á Ólavsøkuframsýningini fyrstu ferð í 1964, og hann hevur sýnt víða. Framsýningin í Leikalund er opin mánadag til leygardag frá kl. 10 til 20.

## Leikhúsjól

Frá í morgin ber til at keypa atgongumerki til Leikhúsjól, sum aftur í ár verða í Sjónleikarhúsinum í Havn. Venjingarnar eru byrjaðar, men fyriskipararnir vilja ikki avdúka, hvussu Leikhúsjól verða í ár, men at farið verður aftur í tíðina og út um landoddarnar. Frumframførslan verður tann 10. desember, og síðani verður spælt átta ferðir til tann 21. desember. Atgongumerkini kosta 60 krónur og fáast í Kunningarstovuni.



*- Vit hava nógv at bjóða her í Klaksvík. Í veruleikanum er tað styttri hjá eysturoyingum at fara til Klaksvíkar enn til Havnar, sigur Bjørghild Magnusson, forkvinna í Klaksvíkar Handilsfelagi*

# Gjørdi mun at tunnilin kom

**Handilslívið í Klaksvík merkir framvegis til positivu avleiðingarnar eftir upplatingina av Norðoyatunlinum.**
**- Her eru fremmandafólk til handils so at siga hvønn einasta dag, sigur forkvinnan í Klaksvíkar Handilsfelagi, Bjørghild Magnusson**

HANDILSLÍV
*Orð & mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Tað var ein heilt serstøk vika hjá handlunum í Klaksvík, tá Norðoyatunnilin lat upp seinast í apríl mánaði í ár.

Samstundis við at tað var koyrandi undir Leirvíksfjørð, var ókeypis at koyra landið runt. Og í hesum sambandi nýttu nógv høvið at fara ein ókeypis túr til Klaksvíkar.

Summi fóru fyri at hyggja seg um og koyra á støð, har tey ikki høvdu verið áður. Men handilsfólk í býnum gjørdu seg til hesa innrásina, og fingu sanniliga eisini gagn av hesum.

Nógv fólk úr Norðoyggjum var at síggja í handlunum hesar dagarnar. Hinvegin vóru sera, sera nógv fólk úr øðrum pørtum av landinum til handils í Klaksvík. Og henda positiva gongdin hevur hildið á, tí handlarnir hava enn nógv at gera.

- Sølan er sjálvandi ikki hin sama sum hesa vikuna. Men hon er í øllum førum meiri enn frammanundan upplatingini av tunlinum, staðfestir Bjørghild Magnusson.

Í Klaksvíkar Handilsfelagi eru 56 limir. Her er talan bæði um handlar, matstovur og onnur virki.

### Meiri peningur

Handilsfólk í Klaksvík síggja tó ein vansa við tunlinum: Gjaldið fyri at koyra til Klaksvíkar.

Fyri tey hevði tað verið best um einki gjald var, tí tað heldur fólki aftur í at koma higar at keypa. Hinvegin so síggja tey ofta, at fleiri sláa seg saman og fara í einum bili.

- Vit vita ikki altíð, hvagani tey eru. Men tey koma innar fyri at hyggja seg um, líkasum fyri at vita, hvat úrval vit hava og eisini fyri at læra handlarnar her at kenna.

- Og tað er meiri enn so komið fyri, at tey hava ringt aftur og bílagt onkra vøru, sum tey sóu, meðan tey vitjaðu her, sigur formaðurin í Handilsfelagnum.

Tey eru eisini vitandi um norðoyingar sum eru farnir aðrastaðni at vitja handlar. Tað vísir seg ofta, at tá tey koma norður um aftur, so siga tey bara: "Tað er gott at vera her. Í Klaksvík er eisini nógv at fáa!"

- Fólk hevur meiri pening um hendi nú. Og tað merkja vit tíbetur eisini, sigur Bjørghild.

## Spenna seg út fríggjakvøldið

**Nú jólamánaðurin byrjar í annaðkvøld, fer Handilsfelagið í Klaksvík eisini at markera hetta. Í fyrsta lagi verða handlarnir opnir til langt út á kvøldið, og verður hetta alt samantvinnað við fleiri onnur tiltøk gjøgnum allan dagin, bæði av handilsligum og mentanarligum slagi. Kvøldið byrjar við at jólatræið verður tendrað. Síðani verður opið hús í KFUM&K, samstundis sum fólk hava høvið at vitja handlar og onnur støð í býnum til kl. 23.**

# Klaksvík sum alternativ havn hjá Norrönu

**Smyril Line og Klaksvíkar kommuna hava undirskrivað ein sáttmála um, at Ánirnar hereftir verða eykahavn hjá Norrönu.**
**- Nú fáa vit skapt bæði menning og virksemi í hetta havnarlagið, sigur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen.**

SKIPAFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Er veðrið so mikið vánaligt at Norröna ikki sleppur til bryggju í høvuðsstaðnum, verður nú høvið til hetta í Klaksvík.

Hetta stendur at lesa í avtaluni, sum varð undirskrivað týsdagin millum báðar partarnar.

Sambært avtaluni skal Klaksvíkar kommuna gera nakrar tillagingar við nýggja havnarlagið í Ánunum, og skal hetta arbeiðið verða liðugt um eina viku.

Havnarlagið skal asfalterast, og enn vantar eitt høli til tollararnar, soleiðis at teir fáa útint sítt arbeiði, tá skip leggja at landi.

- Men tað kemur eisini einaferð seinni, sigur borgarstjórin við Sosialin.

### Góðar umstøður

Við at hava valt Ánirnar sum alternativa havn, hevur ein samstundis valt eitt stað, sum liggur í veðurgóðum umhvørvi og har tað er sera høgligt hjá so stórum skipum sum Norrönu at koma til og frá.

Borgarstjórin í Klaksvík er tí ovurhonds fegin um, at henda avtalan umsíðir er komin í havn.

Kommunan hevur brúkt nógvar milliónir av krónum uppá at laga havnarlagið til hesa uppgávuna, og nú er tað komið so mikið langt, at Norröna veruliga kann leggja til bryggju her í framtíðini, um tað gerst neyðugt.

Umframt avtaluna um kajpláss hevur Norröna eisini møguleikan at fáa sóttreinsað vatn umborð. Sambært avtaluni skal kommunan kunna veita 200 tons av slíkum vatni um tíman.

Ánirnar er eisini atløguhavn hjá verksmiðjutrolaranum Atlantic Navigator. Men avtalan er gjørd soleiðis, at hevur Norröna brúk fyri kajplássi, so má Navigator víkja.



*Tummas Magnussen, stjóri í Smyril Line (vinstrumegin) og Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík fegnast um at avtalan er komin í Havn*

*Mynd: klaksvik.fo*